**XBOX BÍLIGA TIL SØLU**
lítið brúkt, við joystikk og tveimum spølum.
*tlf. 271989*

## Tónleikur

**TVØRFLOYTA**
ynskist til keyps.
*Tlf. 451014*

**BASS-SETT**
Ibanez-bassur, Behringer 60W forsterkari, taska, reim og stativ til sølu fyri 2.900 kr. Settið er 1/2 ár og er sum spildurnýtt.
*Tlf. 265070, eftir kl. 18*

**SONY BILSTEREO**
við MP3 Sony 600w forsterkari Sony 1200w subwoofari til sølu fyri 5.-6.000 kr. Nývirði ca. 10.000,- kr.
*Tlf. 583109*

## Út- & Sjónvarp

**STEREOANLEGG**
við bæði hátalarum og plátuspælara bíliga til sølu.
*Tlf. 421074/503074*

**SJÓNVARP**
21" Samsung sjónvarp til sølu fyri 800,- kr.
*Tlf. 516089*

## Ymiskt

**KØKSKRANI**
Nýggjur óbrúktur køkskrani til sølu fyri 450 kr.
*Tlf. 312968*

**TIL SØLU**
er ein Kenwood DMF 3020 minidisk spæl- og upptakari fyri 2000 kr. Er lítið og einki brúktur. Nýprísur 4.100 kr.
*Tlf. 221826*

**SUN FIE DUO 100 W**
6 stk. rør til sól til sølu.
*Tlf. 265290*

**IP-TELEFON**
Grandstream BT-101 telefon. Sort. Pris 750,- kr.
*Tlf. 581984*

**Á GOYMSLU**
hava vit nøkur sildagørn nýggj og brúkt.
*Tlf. 353897*

**KANN AVHEINTAST**
Hvítt baðikar, sum nýtt, ringið áðrenn.
*Tlf. 317451/215064*

**ÓBRÚKT VENTILATIÓNSANLEGG**
til sølu. Nýprísur 20.000,- Ring og hoyr nærri á
*tlf. 312530*

**FLYTA UTTANLANDS?**
Vit kunnu taka flytigóðs við, sera bíliga. Koyrt verður frá hurð til hurð. Vit ferðast við Norrønu.
*Ringið 213223*

**BINGJA TIL SØLU**
2 stk. 20 fót bingjur til sølu fyri 6.000 kr. tilsamans við at heinta tær í Havnardali.
*Tlf. 213666*

**TIL SØLU**
Ein »skaftivevur« og eitt renniborð fyri 3.500,- kr.
*tlf. 311752/211752*

**BRIDGE**
Opið hús hóskvøld kl. 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Havnar Bridgefelag*

**MARKNAÐARDAGUR Á STRONDUM**
Marknaðardagur í bygdarhúsinum á Strondum. Um nóg stór undirtøka verður, verður marknaðardagur í bygdarhúsinum tann 19. nov. 2005. Tilmeldingáðrenn 16. nov á
*telefon 258936*

**DIGITALT MYNDATÓL**
Nikon Coolpix 4200 digital myndatól bíliga til sølu.4 Mega pixel, 3 x optisk zoom, 256MB kort.
*Ring á tlf. 513928*

**ÁRSMAPPA**
1 føroysk ársmappa frá 1975 til sølu fyri hægst bjóðandi yvir kr. 500,-
*Gunnar tlf. 261670*

**ER TAÐ NAKAR**
sum hevur Kall G-kortið kr. 10,- brúkt ella óbrúkt til sølu ella í umbýti við onnur kort.
*Gunnar tlf. 261670*

**UM TÚ HEVUR**
nakað av mold til sølu, vinarliga ring
*216608*

**MYNDATÓL TIL SØLU**
Eitt Canon EOS300, myndatól til sølu, sera lítið brúkt, bert tikið 3 filmar. Prísuppskot: 2.500 kr. Ring ella maila til: e-mail: jákup_o@online.fo
*Tlf. 226678*

**TIL SØLU**
Nakrar ballir uml. 50 kg. stk. til sølu.
*tlf. 580445*

**RADIATORUR**
dupultur, 250x55 cm. til sølu.
*Tlf. 310255*

**HONDVASK**
keramikk, hvítt, 57x45x20 cm. at hanga á vegg til sølu.
*Tlf. 310255*

**STÁLVASK**
2 stk. 53x40x22 cm. 1 stk. 55x40x14 til sølu.
*tlf. 310255*

**TIL SØLU**
3 stk. Plastmo takvindeygu (pyramideforma) OLI P 402 100x100 cm. til sølu vegna feilkeyp, nú 1/2 prísur.
*Tlf. 251450*

**MYNDATÓL TIL SØLU**
HP digitalt myndatól til sølu! 5,3MP, 3x optiskt zoom, 7x digitalt zoom, docking station v/fjarstýring, 32 MB SD kort, taska o.a. fylgir eisini við. Til sølu fyri 1800 kr.
*Ring tlf. 214789*

**GAMLAR MYNDIR**
vera viðgjørdar, og blíva sum nýggjar. Hygg eftir onkrum dømi á http://spaces.msn.com/members/reginkameraet/PersonalSpace.aspx?_c02_owner=1&_c=
*Ring: 272908 og hoyr nærri*

**HYGG HER**
Hygg her:" http://www.tpi-foeroyar.dk/ " Òtrúliga bílligt. Alt innan foto, blæk, og fotopappír v.m. Skriva til: rtausen@gmail.com ella ring á:
*272908*

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

# Heidi spyr um reingerðina á Landssjúkrahúsinum

**Heidi Petersen, tingkvinna Tjóðveldisfloksins, vil hava at vita, um ætlaðu sparingarnar á Landssjúkrahúsinum kunnu hava víttfevnandi avleiðingar fyri sjúklingarnar, ella um sjúkrahúsini framhaldandi eru trygg, tá tað snýr seg um reingerð og smittuvanda**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



- Kann landsstýrismaðurin upplýsa/greiða frá hvørjar avleiðingar skerjingar av reingerðini á Lansdssjúkrahúsinum kunna hava fyri innløgdu sjúklingarnar í framtíðini?
- Heldur landsstýrismaðurin tað vera rætt at skerja eina so grundleggjandi funktión?
- Eru nakrar kanningar gjørdar sum lýsa støði á reingerðini á føroysku sjúkrahúsunum í mun til grannalondini?
- Vera tilburðir av stafylokokkum á føroysku sjúkrahúsunum skrásettir, og viðføra hesir tilburðir deyðsføll?

Hesar spurningar fer Heidi Petersen, løgtingskvinna Tjóðveldisfloksins at seta Hans Paula Strøm, landsstýrismanni í heilsu- og almannamálum á tingfundinum í dag, tá munnligir fyrispurningar verða svaraðir. Heidi Petersen sigur, at í samband við sparingarnar á Landssjúkrahúsinum verður í einum lítlum setningi kunngjørt, at eisini reingerðin skal skerjast.

– Hetta er ikki fyrstu ferð, at reingerðin á Landssjúkrahúsinum verður skerd, og mín spurningur gongur út upp á at fáa staðfest, hvar markið gongur ímillum at hava eina forsvarliga reingerð á einum stovni fyri sjúk fólk, og nær tað gerst vandamikið fyri borgaran at nýta Landssjúkrahúsið, tí har verður ov skitið, og á tann hátt kann gerast ein hóttan á heilsustøðuna hjá tí sjúka, sigur Heidi Petersen.

Hon vísir eisini á, at í grannalondunum hava sera stórar sparingar verið gjørdar á sjúkrahúsunum. Eisini hava royndir verið gjørdar at útlisitera reingerðina við sera ivasomum úrslitum.

– Føroyingar sum hava ligið á Ríkissjúkrahúsinum, greiða frá ógvusligum avleiðingum av at júst reingerðin hevur verið fyri sparingunum. Staðfest er, at stafylokokkar eru høvuðsorsøkin til infektiónir, fingnar á sjúkrahúsum í Danmark, sigur hon og heldur fram.

– Av hesum eru 1000-1500 tiburðir av multiresistentum stafylokokkum og herav doyggja 20% av sjúklingunum, t.v.s. har doyggja millum 200 og 300 fólk av mótstøðuførum stafylokokkum um árið í Danmark.

Hon heldur, at einasti háttur at fyribyrgja »hospitalsbakteriu« er við gjøgnumførdum reinføri á høgum støði, ikki bara persónligum, men eisini av sjúkrahúsunum sjálvum, hetta tí stafylokokkbakteriur kunna liva sera leingi í støvi. Hetta verður staðfest í grein um stafylokokkar í tíðarritinum hjá donskum bioanalytikarum, har Robert Skov, leiðari av stafylokokk royndarstovuni hjá Statens Serum Institut.

Heidi Petersen sigur, at endamálið við fyrispurninginum er ikki at vera orsøk til eina »ræðsluherferð« um stafylokokkar á føroysku sjúkrahúsunum.

– Heldur er hetta ein roynd veruliga at fáa staðfest, um ætlaðu sparingarnar kunnu hava víttfevnandi avleiðingar fyri sjúklingarnar, ella um sjúkrahúsini framhaldandi eru trygg, tá tað snýr seg um reingerð og smittuvanda.

# John spyr um javnstøðu hjá monnum

**John Johannessen vil hava at vita, hvørji stig landsstýrismaðurin í javnstøðumálum ætlar at taka til tess at tryggja javnstøðuna hjá monnum**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



- Hvussu heldur landsstýrismaðurin, at samsvarið er millum politiska ynskið um javnstøðu millum kynini og galdandi lóg um foreldramyndugleika, har ógiftir pápar ongan lógartryggjaðan rætt hava til síni egnu børn?
- Hvussu heldur landsstýrismaðurin tað samsvarar við javnstøðuhugburðin, at ógiftir pápar verða kallaðir inn til politiforhoyr, fyri at staðfesta faðirskapin, meðan hetta í øðrum londum verður gjørt við at senda eitt oyðiblað inn til myndugleikarnar, eins og í øllum vanligum málum?
- Ætlar landsstýrismaðurin í javnstøðumálum at seta seg í samband við landsstýrismannin í lógarmálum, fyri at samskipa javnstøðulóggávuna og familjurættarlóggávuna.

Hesar spurningar fer John Johannessen, løgtingsmaður, at seta Hans Paula Strøm, landsstýrismanni í javnstøðumálum á løgtingsfundinum í dag, tá munnligir fyrispurningar eru á skránni.

Johan Johannessen vísir í viðmerkingunum á, at nógv hevur verðið gjørt, fyri at styrkja um javnstøðuna millum kynini hesi seinastu árini.

– Hetta er sjálvsagt, og tí eisini at fegnast um. Tó ber til við røttum at siga, at javnstøðuarbeiðið nærum bert hevur snúð seg um javnrættin hjá kvinnum, meðan hugburðurin hinvegin hevur verið, at javnstøðan hjá monnum er sjálvsøgd, heldur John Johannessen.

Hann sigur, at javnstøðan hjá monnum er kortini ikki sjálvsøgd. Í øllum førum ikki, tá tað um familjurættarlóggávu ræður. Galdandi lóg um foreldramyndugleika er frá 1922 og gevur bert mammum foreldrarætt í teimum førum, har foreldrini ikki eru gift. Soleiðis hevur maðurin ongan lógartryggjaðan rætt til síni egnu børn. Ikki so mikið sum rættin at luttaka á skúlaráðsvali.

– Hetta kann eftir míni fatan ikki fatast sum javnstøða millum kynini. Tískil er tað at fegnast um, at nývaldi formaðurin í Javnstøðunevndini hevur boðað frá, at hann ætlar sær at arbeiða við hesum málinum, sigur John Johannessen.

Eftir somu lóg um foreldramyndugleika verða ógiftir pápar eisini í hvørjum einasta føri kallaðir inn á Fútaskrivstovuna til forhoyr fyri at staðfesta faðirskapin. Hetta hóast foreldrini dagliga liva saman og gjøgnum sjúkrahúsverkið hava boðað frá, at tey í felag eiga barnið.

– Hetta má metast at vera niðrandi eftir vanligari fatan í 2005. Slík mál áttu at kunnað verið avgreidd eins og í øðrum londum við vanligum oyðibløðum at senda inn til myndugleikarnar, soleiðis at sleppast kann undan niðrandi innkallingunum á Fútaskrivstovuna at viðurkenna síni egnu børn, heldur John Johannessen.

John Johannessen heldur, at javnstøðulógin er gjørd fyri at tryggja javnstøðu ímillum bæði kynini, og tí setir hann hendan fyrispurningin fyri at vita, hvørji stig landsstýrismaðurin í hesum føri ætlar at taka fyri eisini at tryggja javnstøðuna hjá monnum.